


*Løgreglan í høvuðsstaðnum hevur fyrireikað seg til, at nógv fólk og ferðsla verður í Gundadali í sambandi við landsdystin í dag*

## Løreglan er fyrireikað

**Havn:** Tað verður nógv ferðsla í og kring Gundadal í sambandi við landsdystin millum Føroyar og Danmark í dag.

Men hetta hevur løgreglan í Havn fyrireikað seg til. Hon fer at verða á gøtuni í sambandi við dystin, og løgreglufólkini fara at fáa eina hjálpandi hond frá bjargingarfelagnum í Havn eisin.

Løgreglufólk fara at vísa bilum til tey ymisku parkeringsplássini, sum eru nærindis Tórsvøll, og á politistøðini í Havn verður ikki roknað við hurlivasa fyri tað um eini 6000 fólk fara til dystin. Tað hava áður verið fleiri fólk til tiltak í Gundadali, og tað bar eisini til.

Løgreglan mælir fólki til at koma í góðari tíð, um tey skulu fáa parkeringspláss nær Tórsvøll, og so hevði tað ikki verið av vegnum um havnafólk, sum búgva í rímuligari frástøðu frá vøllinum, lótu bilin standa heima og gingu til dystin.

**ek**



*Løgreglan í Eysturoy kannaði mánadagin bilar á Lambareiði. Savnsmynd*

## 26 vórðu skrivaðir upp

*Løgreglan í Eysturoynni hevði mánadagin paragraf 13 kanningar á Lambareiði*

**Eysturoy:** Mánadagin var løgreglan í Runavík úti og kannaði bilar. 53 bilar vórðu steðgaði á Lambareiði, og umleið helmingurin av teimum varð skrivaður, tí okkurt var í vegin.

Átta bilførarar høvdu ikki koyrkoyrtið hjá sær, og tað fáa teir eina bót fyri. Seks koyrdu uttan trygdarbelti, fimm høvdu ikki koyriljósini tendrað og tríggir fáa bót fyri bæði koyrikoyrt, trygdarbelti og koyriljós.

Ein bilførari varð uppskrivaður fyri at tokuljós, og ein bilur hevði lyktafeil.

Paragraf 13 kanningin hjá løgregluni í Eysturoy fór fram frá klokkan 13.05 til 14.45 mánadagin.

**ek**

# Lítil vón fyri teimum umborð á Kursk

*Roynt verður at bjarga manningini umborð á russiska kavbátinum, Kursk, men vónirnar til at tað skal eydnast eru smáar*



*Russiski kavbáturin, Kursk, er sokkin í Barentshavinum*

Eyðun Klakstein

Sunnudagin hendi eitt óhapp við russiska kavbátinum, Kursk, sum var staddur í Barentshavinum. Óhappið gjørdi, at kjarnorkudrivni kavbáturin sakk, og nú liggur hann á 50 metra dýpi í altjóða sjógvi einar 130 kilometrar í ein útnyðring úr Murmansk.

116 fólk eru við kavbátinum, og sambært russisku sjóverjuni er øll manningin á lívi. Tíðindi gingu annars mánadagin um, at partar av manningini hevði latið lív undir óhappinum, men í gjár segði ein talsmaður fyri russisku sjóverjuna, at øll manningin var á lívi.

Talsmaðurin segði, at tað hevði eydnast manningini umborð á Kursk at lata boð frá sær.

– Vit hava fingið at vita, at eingin er deyður umborð, men tað er framvegis eitt sindur ógreitt, um nakar hevur fingið skaða, segði talsmaðurin av støðini í Severomorsk.

### Kanska spreinging

Manningin á Kursk noyddist at sløkkja kjarnorkureaktorarnar umborð á kavbátinum undir eini hernaðarvenjing sunnudagin. Orsøkin til óhappið er ikki staðfest enn.

Russiskir myndugleikar siga, at Kursk rendi á okkurt annað far í sjónum og fór at leka. Bretskir og amerikanskir myndugleikar hava svarað hesum pástandum við at siga, at eingin av teirra kavbátum kann hava verið partur av óhappinum.

Sambært russisku tíðindastovuni, Itar-Tass, hava fyrstu myndirnar av kavbátinum ikki staðfest, at talan hevur verið um samanstoyt.

Onkrir fjølmiðlar hava róð framundir, at ein spreinging var umborð á kavbátinum, og at hetta var orsøkin til, kavbáturin sakk.

### Royna at bjarga

Í gjár fingu russar streym og súrevni niður til kavbátin, men manningin hevur fingið um at spara súrevni.

Leiðarin fyri norska umhvørvisfelagsskapin, Bellona, sigur, at hóast tað ivaleyst er nóg mikið av mati, súrevni og streymi til at manningin kann verða á lívi í longri tíð, er manningin í eini panikkstøðu, og tá tað fer at ganga undan við súrevni, veit eingin, hvat kann henda, hóast manningin er vælvand og disiplinerað.

– Nú gera vit alt fyri at bjarga manningini, men møguleikarnir hjá teimum fyri at yvirliva eru ikki serliga stórir, segði Vladimir Kurojedov, admiralur, í gjár.

Onnur fólk í russisku sjóverjuni halda, at møguleikarnir eru góðir fyri at bjarga manningini, men hesum ivast serfrøðingar í.

# Nýggjan sløkkiliðsbil um einar tvær vikur

*Síðst í hesum mánaðinum fær Klaksvíkar Sløkkilið nýggjan flutningsbil*

Eyðun Klakstein

**Klaksvík:** Um einar tvær vikur kemur nýggjur sløkkiliðsbilur til Klaksvíkar.

Tað er ein VW fyri knapt 300.000 krónur, sum skal avloysa ein gamlan VW-flutningsbil.

– Tað gamli flutningsbilurin hevur tænt fyri seg, og tað var neyðugt at skifta hann út nú, sigur Kári Kjelnes, sløkkiliðsleiðari.

– Nýggi bilurin er bæði hægri og longri enn tann gamli, og hann fer tí at betra um okkara umstøður.

### Flyta útgerð

Nýggi flutningsbilurin skal nýtast til at flyta útgerð og fólk, tá neyðsendaørindi eru. Í bilinum verða pumpur, froskmannaútgerð og annað, sum sløkkiliðið nýtir í sínum arbeiði.

– Í nýggja bilunum fara froskmenninir hjá okkum at hava betri møguleika fyri at skifta, meðan vit koyra, tí teir kunnu standa upprættir, sigur Kári Kjelnes.

Tann gamli VW-bilurin hevur 26 ár á baki, og nú ein nýggjur bilur kemur, verður tann gamli seldur. Klaksvíkar Sløkkilið hevur tveir aðrar bilar, og teir eru báðir um 14 ára gamlir.

Klaksvíkar Sløkkilið verður 50 ár í september mánaði, og tá verður helst okkurt gjørt burturúr.

16 mans eru í sløkkiliðnum í Klaksvík.




*Seinasta stóra uppgávan hjá sløkkiliðnum í Klaksvík var, tá eldur kom í teldufyritøkuna Com-Data í mai mánaði. Um einar tvær vikur ella so, fær Klaksvíkar Sløkkilið nýggjan flutningsbil. Mynd: JH*



# Halda við Danmark

*Tað eru ikki øll sum eru teirri løttu støðu, at tey eru sannførd um hvat lið tey helst síggja vinna á Tórsvølli í kvøld. Summir føroyingar eru í tvístøðu og aðrir halda stutt og greitt við danska landsliðnum.*



Rúnar Reistrup

Í dag klokkan fýra hittast 15-20 ungir føroyingar, ið ætla sær til fótbóltsdyst á Tórsvølli millum landsliðini hjá ávikavist Føroyum og Danmark.

Teir ætla sær at byrja kvøldið upp á danskan manér við sild og sanps og einari góðari danskari øl, kanska repetera teir danska tjóðsangin, og fara so at ragga sær oman á tjóðarstadion føroyinganna at rópa »Danmark!«.

Teir hava allir einslittar troyggjur, ið teir hava fingið sponsoreraðar av Eurosport og einum donskum sponsori. Onkur tvílittur klapphattur verður kanska eisini á høvdinum á onkrum teirra.

– Hetta eru øll fólk, ið eru í tvístøðu. Fleiri vita ikki reiðiliga um tey skulu halda við Føroyum ella Danmark, og nøkur hava longu gjørt upp við seg sjálvan, at tey altso halda mest við Danmark, sigur Michael Jensen, ið verður ein av teimum, ið fer oman á Tórsvøll við hesum kompanínum.

*Nógvir føroyingar halda vanliga við danska landsliðnum, og hjá onkrum er tað ikki so lætt at gera upp við seg sjálvan, hvønn man skal halda við í kvøld, tá hetta liðið fer á vøllin ímóti føroyingum*

### Plaga at halda við Danmark

Hann sigur eina av orsøkunum til tvístøðuna vera, at tá danska landsliðið annars spælir, plaga tey at fylgja liðnum á sjónvarpsskíggjanum og gleðast og syrgja saman við tí. Tí ber ikki knappliga til hjá teimum at forkasta liðið, bara tí tað spælir ímóti føroyska landsliðnum. Her kemur óskil á kenslurnar.

– Fólkini eru nokkso ymisk, og eg vænti, at um Føroyar skora, so reisir onkur seg helst upp. Men tað vera so eisini nøkur, ið vera sitandi, um hetta hendir, sigur Michael.

### Skeið av speiðsemi

Vinnur Danmark í kvøld, so væntar Michael, at »selskapið« fer at halda fram ein løtu eftir dystin at fegnast um úrslitið saman.

Skuldi tað hent hinvegin seg, at Føroyar vunnu, so er væntandi at fólk fara hvør til sítt og síggja fram til næsta dyst hjá liðnum, sigur Michael Jensen. Hann leggur ikki lok á, at tað er við einum knívspíssi av provokatión og einari skeið av speiðsemi, at lagt verður soleiðis fyri í sambandi við landsdystin millum Føroyar og Danmark, ið óansæð hvussu hann verður vendur hevur djúpar politiskar og tjóðskaparligar undirtónar.

# Føroya Tele er svar skyldugt

*Fjarskiftiseftirlitið tekur málið um brekið við avrokningarskipanini hjá Føroya Tele í størsta álvara, og longu gjáramorgunin sendi eftirlitsstovnurin fimm fyrispurningar til telefyritøkuna fyri at fáa greiðu á málinum um skeivu telefonrokningarnar*



Rúnar Reistrup

Sosialurin kundi í gjár siga frá um, hvussu brek á avrokningarskipanini hjá Føroya Tele hevur havt við sær, at summir telefonfelagar hava goldið nógv meira í telefonrokning enn teir av røttum burdu.

Útgreinaðar telefonrokningar, sum blaðið hevur fingið hendur á, vístu, at brekið á avrokningarskipanini hevur kostað einum einstøkum telefonfelaga nærum tveytúsund krónur hetta farna hálva árið.

Á Føroya Tele vistu tey um brekið, men høvdu ikki boðað nøkrum frá, kom fram í greinini.

### Álvarsmál

Fjarskiftiseftirlitið, ið millum annað hevur eftirlit við at lógin um fjarskifti verður hildin, og at tey givnu fjarskiftisloyvini verða røkt sambært heimildunum, hevði ikki fingið nakra fráboðan frá Føroya Tele, hóast talan var um ein álvarsligan trupulleika.

Tískil visti Fjarskiftiseftirlitið einki, fyrrenn tað kom fram í Sosialinum, og gjárdagin royndi stovnurin at fáa greiðu á málinum.

Fyrrapartin sendi stovnurin nakrar fyrispurningar til Føroya Tele og bað um at fáa hesar svaraðar innan hósdagin á middegi.

– Vit taka hetta málið í størsta álvara, og tí er freistin so stutt, sigur Jógvan Thomsen, stjóri á Fjarskiftiseftirlitinum.

### Fimm spurningar

Stovnurin spyr fyrst og fremst Føroya Tele, um hald er í tí, sum stendur at lesa í greinini í Sosialinum týsdagin, og um so er, verður Føroya Tele biðið at greiða frá, nær trupulleikin er uppkomin, hvussu leingi hann hevur verið, hvat verður gjørt fyri at loysa trupulleikan, og nær Føroya Tele hevur í hyggju at greiða viðskiftafólkum sínum frá, hvussu trupulleikin verður loystur.

Stjórin á Fjarskiftiseftirlitinum er varin við at siga nakað um málið, áðrenn Føroya Tele hevur gjørt sína støðu greiða, men sigur kortini, at um so er, at tað er rætt, at fyritøkan hevur vitað av brekinum í tríggjar vikur uttan at boða Fjarskiftiseftirlitinum frá, so er tað eina átalu vert.

Sambært Jógvani Thomsen er sjálv avrokningin av telefonsamrøðum eitt av viðurskiftunum, ið undir øllum umstøðum mugu vera í lagi. Tí hevur málið øgiligan skund, sigur hann.

### Bið um rokningina

Hevur ein telefonfelagi varhugan av, at okkurt ikki ruggar rætt við avrokningini av telefonsamrøðum hansara, ræður Jógvan Thomsen til, at viðkomandi setir seg í samband við Føroya Tele og roynir at fáa ivamálið loyst í samstarvi við fyritøkuna.

Hetta kann millum annað gerast við at biða um útgreinaða telefonrokning. Hendan kann beinanvegin avdúka, um okkurt ikki er farið rætt fram í avrokningini.

Eydnast tað ikki at loysa málið í samstarvi við Føroya Tele, so ber til at senda klagu til Fjarskiftiseftirlitið, ið síðan tekur málið upp.

Eftir hvat skiltst á Føroya Tele í gjár, so ætlaði fyritøkan at loysa málið skjótast gjørligt. Helst fóru fyrispurningarnir frá Fjarskiftiseftirlitinum at verða svaraðir longu seinnapartin í gjár.